# Dátuviðgerðaravtala

Millum

Nordik-KT APS

Bårdesøvej 25
5450 Otterup

CVR: 42220221

V-tal: 652202

hereftir nevndur "dátuviðgerin"

og

hereftir nevndur "dátuábyrgdarin"

## 1. Endamál og nýtsla

Hendan avtalan lýsir hvussu dátuviðgerin skal viðgera persónupplýsingar fyri dátuábyrgdaran.

Viðgerðin skal fara fram í samsvari við dátuverndarlógina. Viðgerðin fevnir t.d. um umsiting av telduskipanum og netverki hjá dátuábyrgdaranum.

## 2. Boð frá dátuábyrgdaranum

Dátuviðgerin arbeiðir á grundarlagi av avtalu við dátuábyrgdaran og hevur fastan atgongd til skipanir fyri at veita KT-tænastur, viðlíkahald og neyðuga hjálp.

Allir arbeiðshættir skulu tó vera í samsvari við dátuverndarlógina og hava til endamáls at veita tænastur eftir avtalu.

Allar viðgerðir verða lýstar í aðrari tænastuavtalu.

## 3. Trygd og trúnaðarskylda

Dátuviðgerin skal verja upplýsingar við viðkomandi tekniskum og fyrisitingarligum tiltøkum.

Persónar við atgongd skulu vera bundnir av trúnaði.

## 4. Undirdátuviðgerar

Undirdátuviðgerar kunnu bert nýtast við góðkenning.

Dátuábyrgdarin kann krevja prógv fyri trygd hjá hesum veitarum.

## 5. Hjálp til dátuábyrgdaran

Dátuviðgerin skal veita stuðul við at lúka reglur í dátuverndarlógini.

Hetta fevnir um trygdarbrot, rættindi og váðametingar.

## 6. Afturlating og striking

Tá viðgerðin er liðug, skulu upplýsingar latast aftur ella strikast. innan 30 dagar.

Dátuábyrgdarin hevur rætt til váttan fyri hetta.

## 7. Broytingar

Avtalan kann broytast tá lógarásetingar broytast.

Broytingar verða fráboðaðar við 10 yrkadaga freist.

## 8. Gildi og uppsøgn

Avtalan er galdandi, so leingi samstarvið millum partarnar er í gildi.

## 9. Undirskriftir

Vegna Nordik-KT: ________________________

V-tal: 42220221

Vegna: ________________________

V-tal: